

*JónTórður Holm og Bárður Dimon blokera væl, fyri einari naskari B68 málroynd, og væl gekk eisini. Málið var hildið reint, samstundis sum at aldursforsetin skoraði trý mál*




*Dan Djurhuus hjá VB/Sumba, var aftur hesaferð, ein av sjónligastu leikarum felagsins. VB/Sumba vann 4-3 á heimavølli móti NSÍ*



*AB vann heili 7-0 í fyrsta landskappingardysti teirra í 1. Deild, og vónir teirra, at røkka Formula fótbólti í næsta ár, munnu ivaleyst vera góðar*

gjørdist ein tepur 4-3 sigur til heimaliðið, ið var aftanfyri 2-1 í hálvleikinum. Heili tvey brotsspaøk fullu í dystinum, og fingu liðini eitt hvør. VB/Sumba hevði fingið ein gamlan kenning aftur í álopið, og var Birgir Jørgensen teimum ein góður maður, móti runavíkingum. Hann endaði dystin við tveimum málum, og tað má bara staðfestast, at vágamaðurin í VB/ Sumba er ein av bestu avsluttarunum í landinum. Hann er ísakaldur frammanfyri málinum, og júst tí hevur hann eisini verið so langt frammi á toppskjúttaralistanum, seinastu mongu árini.

Deiligt at síggja at fótbólturin er komin í gongd aftur, og spennandi verður at fylgja kappingini um uppflyting, sum longu nú er hørð.




*Jónar Dahl fer her strúkandi fram eftir vinstra vongi, og álopsspælinum hjá heimaliðnum bilti heldur onki. Verri er statt í verjupartinum, har NSÍ slapp framvið tríggjar ferðir*